# Tann kristna vónin

Eivinn Bringsberg

***Vónin er drívkraftin til at liva í trúgv her niðri.***

**Kol 1:3-6**: Vit takka Gudi og Faðir Harra okkara Jesu Krists, altíð táið vit biðja fyri tykkum;
tí vit hava hoyrt um trúgv tykkara á Kristus Jesus og kærleikan, ið tit hava til øll hini heiløgu
**fyri vónarinnar skuld,** sum tykkum er goymd í Himlunum, og sum tit frammanundan hava hoyrt um við orði sannleikans í evangeliinum,
sum komið er til tykkara, eins og tað eisini er í øllum heiminum, og ber ávøkst og veksur – sum hjá tykkum, frá tí degi tit hoyrdu tað og av sonnum lærdu at kenna náði Guds.

**Titus 1:1:** Paulus, tænari Guds og ápostul Jesu Krists, til at virka trúgv hjá hinum útvaldu Guds og kunnskap um sannleikan, sum hoyrir til gudsótta,
**í vón um ævigt lív,** sum Gud, ið ikki lýgur, hevur lovað frá ævigum tíðum.

***Róm 15:9-13:*** men heidningarnir skulu prísa Gudi fyri miskunn – sum skrivað er: „Tí skal eg játta Teg millum heidningar og lovsyngja navni Tínum."
Uppaftur verður sagt: „Gleðist, tit heidningar, saman við fólki Hansara!"
Og uppaftur: „Lovið Harranum, allir heidningar, og prísið Honum, øll fólk!"
Uppaftur sigur Esaias: „Koma skal rótskot Ísais, Hann, sum reisist at ráða yvir heidningum; á Hann skulu heidningar vóna."
**Gud vónarinnar fylli tykkum** við allari gleði og øllum friði í trúnni, so tit kunnu vera rík í vónini við kraft Heilaga Andans!

Í lívinum hjá teimum fyrstu kristnu fylti vónin so nógv, at tey við gleði fóru inn í martýrdeyðan fyri sína trúgv
Hetta lívið var bert ein fyrireiking til hitt komandi, tí fylti vónin nógv meir enn gleðirnar í hesum lívinum.

**Vónin hyggur forbí hetta lívið og teir begrensningar, sum eru í hesum lívinum.**

***Sjálvt um hetta lívið er fult av góðum tingum og signingum, sum vit kunna og skulu gleðast yvir, so er hetta lívið sera begrensa í forhold til tað, sum koma skal.***

**Ein trúgvandi verður ongantíð nøgdur við hetta lívið, sum er fult av stríð og begrensningum.**
**Í tí komandi lívinum kemur tú ikki at feila, tí tú kemur at verða sum Hann er.**
**Í tí komandi lívinum er onki ónt t.v.s. ongar freistingar**
**Í tí komandi lívinum er ongin sjúka, deyði, ella sorg**

**Op 21:22-27** Eg sá einki tempul í honum; tí tempul hansara er Harrin Gud hin Alvaldi og lambið.
Staðnum tørvar ikki sól ella mána at lýsa sær, tí dýrd Guds lýsir hann upp, og lambið er ljós hansara.
Fólkasløgini skulu ganga í ljósi hansara, og kongar jarðarinnar skulu bera dýrd sína inn í hann.
Portur hansara skulu aldri verða stongd um dagin – tí nátt skal ikki vera har.
Dýrd og æra tjóðanna skal verða borin inn í hann.

***Einki óreint skal koma inn í hann, og eingin, sum ger tað, ið viðurstyggiligt er, ella gongur við lygn – bert tey, sum skrivað eru í lívsbók lambsins.***

Ístaðin fyri ein heim fullan av deyða, sjúku, sálarsárum, hatur, einsemi, beiskleika og banningum koma vit at uppliva eina tilveru, hvar grøðing, friður, kærleiki og sonn frígerandi gleði verður í dagligdegnum

**Hví??**

***Tí Gud hin alvaldi og Lambið, Jesus Kristus skulu stýra og ráða har.***

**OP 22:1-7:** Hann vísti mær nú lívsvatnsánna, skínandi sum krystal; hon rann út frá hásæti Guds og lambsins.
Mitt á gøtu staðarins og báðumegin ánna var træ lívsins, sum bar tólv ferðir ávøkst – hvønn mánað gav tað ávøkst sín; bløð træsins vóru tjóðunum til grøðing.
Einki bann skal vera longur. Hásæti Guds og lambsins skal vera í honum, og tænarar Hansara skulu tæna Honum.
Teir skulu síggja ásjón Hansara, og navn Hansara skal vera á pannum teirra.
Nátt skal ikki vera longur; og teimum tørvar ikki lampuljós ella sólarljós; tí Gud Harrin skal lýsa yvir teimum, og teir skulu vera kongar í aldur og allar ævir.
Hann segði við meg: „Hesi orð eru trúverd og sonn; og Harrin, Gud anda profetanna, hevur sent eingil Sín at vísa tænarum Sínum tað, sum skjótt fer at henda.
Eg komi skjótt! Sælur er tann, ið heldur fast við profetorðini í hesi bók!“

## Vit søkja hin komandi stað

**Hebr 13:14:** – Vit hava jú ongan verðandi stað her; vit søkja hin komandi.
Tað sum er her í hesum heimið varðar ikki tað heldur altíð uppat

Tann stóri spurningurin fyri títt og mítt lív, er ikki fyrst og fremst, hvussu gott hava vit tað, meðan vit liva her, men heldur, hvar skulu vit verða í ævinleikanum

Bíblian er full av ávaringum um, at vit skulu møta einum ævinleika og at øll menniskju hava eina ódeyðiliga sál.

*Tey sum hava valt Jesus her í lívinum, hava fyrst og fremst gjørt tað, tí tey vilja fyrireika seg til eina komandi tilveru eftir hetta lívið, tí at uttan Jesus vil ævinleikin verða uttan vón, uttan gleði, uttan hvíld, ein ævinleiki í angur fyri spiltar møguleikar, fyri eitt lív oyðsla burtur í synd og eitt lív, sum endar í eini vanlukku.*

**Vit søkja hin komandi stað.**

Líka so víst sum Gud hevur hevur sett mørk, tíðir og og lógir fyri hesa jørð, sum er okkara fyribils stað at verða á, so hevur hann lova okkum ein komandi stað

**Jóhs 14:1-4:** „Hjarta tykkara óttist ikki! Tit trúgva á Gud – trúgvið á Meg við!
14:2: Í húsi Faðirs Míns eru nógvir bústaðir; var tað ikki so, hevði Eg sagt tykkum tað; tí Eg fari burtur at gera tykkum stað til reiðar.
14:3: Og táið Eg eri farin burtur og havi gjørt tykkum stað til reiðar, komi Eg aftur og taki tykkum til Mín, so eisini tit skulu vera, har sum Eg eri.
14:4: Og hagar sum Eg fari, vita tit vegin."

## Trúgv á Jesus er ein avgerð, sum geldur ævinleikan

**1 Jóhs 5:13:**
Hetta havi eg skrivað til tykkara, fyri at tit skulu vita, at tit hava ævigt lív, tit, ið trúgva á navn Guds Sonar.

**Hetta æviga lívið byrjar longu her. Men tað kemur ikki í sína FULLU DIMENSIÓN FYRR ENN VIT ERU KOMIN HAR, SUM HANN ER**

**1 Kor 13:12**
**Nú síggja vit jú í spegli, óklárt; men tá skulu vit síggja *andlit til andlit*; nú kenni eg í brotum, men tá skal eg kenna til fulnar, eins og eg sjálvur eri til fulnar kendur.**

**Jóhs 20:30:** – Eisini mong onnur tekin, sum ikki eru skrivað í hesi bók, gjørdi Jesus fyri eygum lærisveina Sína.
20:31: Men hesi eru skrivað, fyri at tit skulu trúgva, at Jesus er Kristus, Sonur Guds, og fyri at tit – við at trúgva – skulu hava lív í navni Hansara.

## Sum Kristin eru vit í tí støðu, at bíða eftir tí æviga lívinum (vit bíða eftir tí fullu dimensiónini, tá vit verða íklædd eitt uppreisnarlikam og skulu síggja Hann, sum hann er)

**Judas 1:20-21:**
Men tit, elskaðu, uppbyggið tykkum á heilagastu trúgv tykkara, biðið í Heilaga Andanum,og haldið tykkum soleiðis í kærleika Guds, **meðan tit bíða eftir náði Harra okkara Jesu Krists til ævigt lív!**

## Nýggjatestamenti lýsir altíð vónina, sum nakað, sum liggur í framtíðini, men sum tó er fullkomuliga vist og satt, at tað hendir

Alt, sum vit uppliva her, fær ein enda, eisini tey góðu tingini, sum verða signaði av Gudi.
Men tað, sum vit síggja frammímóti, í Himlinum, fær ongan enda
Vónin er trúarinnar veingir
Vónin sær forbí forðingarnar og hindringarnar á vegi trúarinnar
Tann kristna Vónin er trygg og føst
Øll fólk vóna okkurt
T.d. øll, sum keypa lottoseðlar, vóna at vinna

Tú lesur eina reklamu, sum sigur skava og vinn, so keypir tú ein seðil og vónar, at tað er tann rætti.
Tey flestu høvdu verði samd í, at reklaman hevði verði meira realistisk, um tað stóð, skava og tap.

**Soleiðis er ikki við tí kristnu vónini.**

**Hebr 6.10-12**

6:10: Gud er ikki órættvísur, so Hann skuldi gloymt verk tykkara og kærleikan, ið tit hava víst navni Hansara, við tað at tit hava tænt og tæna hinum heiløgu.
6:11: Men ynski okkara er, at ein og hvør tykkara líka til endan skal ***vísa sama íðinskap fyri hini fullu vissu í vónini,***
6:12: so tit ikki verða trek, men eftirfylgja teimum, sum við trúgv og toli arva lyftini.
6:13: Tí táið Gud gav Ábrahami lyftið, svór Hann um Seg sjálvan, av tí Hann hevði ongan størri at svørja um, og segði:
6:14: „Sanniliga, Eg skal ríkliga signa teg og stórliga lata teg nørast!“
6:15: – Táið hann soleiðis tolin hevði bíðað, fekk hann tað, sum lovað var.
6:16: Menniskju svørja jú um tann, ið størri er, og eiðurin er teimum staðfesting og ger enda á øllum stríði.
**6:17: Táið nú Gud enn týðiligari vildi vísa arvingum lyftisins, hvussu óvikandi ráð Hansara var, legði Hann tí eið aftrat,**
**6:18: so vit við tveimum óvikandi søgnum, sum Gud ómøguliga kundi lúgva í, skuldu hava sterka troyst, vit, sum hava leitað okkum bjarging í at grípa vónina, sum framman fyri okkum er løgd.**
**6:19: Í teirri vón hava vit eins og trygt og fast akker sálarinnar, sum fer inn, inn um forhangið,**
**6:20: hagar Jesus sum fyrirennari okkara fór inn, Hann, sum gjørdist høvuðsprestur í allar ævir á hátti Melkizedeks.**
**Tú mást grípa um tað vónina, sum Gud hevur lova teimum, sum í Kristusi eru arvingar lyftisins.**
**Fyrirennari okkara, Jesus, hevur fest akker sálarinnar, sum er vón okkara, í himlinum, har, sum Hann er farin frammanundan, at gera ein stað tilreiðar fyri okkum**

**Sagt um vón:**
***At liva, uttan at vóna, er at gevast at liva***
**Helheimur er vónloysi**
**Tað var ikki tivildarligt at Dante, tá hann skuldi lýsa Helheimin, skrivaði at omanfyri inngongdina stóð henda innskrift " tú sum ætlar tær inn gjøgnum hesar dyr, mást eftirlata alla vón uttanfyri"**

**Onkur hevur sagt, at Vónin er trúgv, sum stendur á tá, altso trúgv, sum kagar longur fram enn hetta lívið**

## Tann kristna vónin setur focus á ævinleikan og tey andaligu virðini

Hetta lívið, her niðri á fold, eigur ikki at fanga hjørtu okkara, sum trúgva á Jesus.

Men ert tú í tí støðu, at tú ikki hevur tikið ímóti Jesusi í tínum hjarta, so vil tað, sum hoyrir hesum heimið til, verða tað, sum fyllir títt lív og tína tilveru.

**Guds orð sigur týðuliga, hvussu ein trúgvandi skal fyrihalda seg til Heimin**
**1 Jóhs 2:15-17:**
Elskið ikki heimin, ei heldur tað, sum í heiminum er! Um onkur elskar heimin, er kærleiki Faðirsins ikki í honum.
2:16: Tí alt, sum í heiminum er – lystur holdsins, lystur eygnanna og stoltleiki lívsins – er ikki av Faðirinum, men av heiminum.
2:17: Og heimurin forgongur, og lystur hansara; men tann, ið ger vilja Guds, verður í allar ævir.
***Brøður og systrar, vit eiga altíð at spyrja okkum sjálvi:***
Elski eg Heimin….ella elski eg Jesus og at gera vilja hansara
Verði eg drivin av holdsins lyst – tráðan eftir tí, sum hesum heimið hoyrir til og sum nøktar tann tørv, sum holdið hevur.
Ella tráði eg eftir tí, sum er omanífrá.
***Vit skulu søkja tey virðir, sum eru omanífrá***
**Kol 3:1** …sigur

3:1: Eru tit tá uppreist við Kristusi, ***so søkið tað, sum omanfyri er, har Kristus situr við høgru hond Guds!***
***3:2: Tráið eftir tí, sum omanfyri er, ikki eftir tí, sum á jørðini er!***
3:3: Tit eru jú deyð, og lív tykkara er fjalt við Kristusi í Gudi.
3:4: Táið Kristus, lív okkara, opinberast, skulu eisini tit opinberast við Honum í dýrd.
Hvat er tað sum er omanífrá.
**Róm 14:17**: Tí ríki Guds er ikki at eta og drekka; nei, tað er rættvísi, friður og gleði í Heilaga Andanum.
**Kol 3:5-17:** Deyðið tí hinar jørðisku limirnar: Siðloysi, óreinsku, girndarbruna, ónda tráan – og havisjúkuna, sum jú er avgudadýrkan!
3:6: Fyri hetta kemur vreiði Guds.
3:7: Í hesum livdu tit eisini áður, táið tit høvdu lív tykkara í tí.
3:8: Men nú skulu eisini tit leggja tað av alt samalt: Vreiði, illsinni, óndskap, háð, skammiligt tos av munni tykkara.
3:9: Lúgvið ikki hvørt fyri øðrum, tit, sum jú hava latið tykkum úr hinum gamla menniskjanum við verkum tess
3:10: og latið tykkum í hitt nýggja, sum verður endurnýggjað til kunnskap – eftir mynd Hansara, sum skapti tað!
3:11: Her er ikki Grikki og Jødi, umskorin og óumskorin, fremmandur, Skýtti, trælur, frælsur – nei, Kristus er alt og í øllum.
3:12: Latið tykkum – sum hini útvaldu, heiløgu og elskaðu Guds – í hjartans miskunn, góðsku, eyðmjúkleika, spakføri, langmóð!
3:13: Umberið hvørt annað, og fyrigevið hvørt øðrum, um onkur hevur klagu móti onkrum! – Sum Kristus hevur fyrigivið tykkum, skulu eisini tit fyrigeva.
3:14: Men yvir alt hetta – klæðið tykkum í kærleikan, tí hann er band fullkomileikans!
3:15: Friður Kristusar ráði í hjørtum tykkara, hann, sum tit eisini vórðu kallað til í einum likami – og verðið takksom!
3:16: Latið orð Kristusar búgva ríkliga millum tykkara, so tit í øllum vísdómi læra og áminna hvørt annað við sálmum, lovsongum og andaligum vísum og syngja yndisliga í hjørtum tykkara fyri Gudi!
3:17: Alt, sum tit gera í orði ella verki – gerið tað alt í navni Harrans Jesusar, takkandi Gudi Faðir við Honum!

**Hetta eru Himmalsk virðir: miskunn, góðska, eyðmjúkleiki, spakføri, langmóð, at umbera og fyrigeva hvørjum ørðum og at íklæða okkum kærleikan.**
**Hesi virðir eru høgt sett í Himli, hetta eru virðir, sum koma omanífrá.**

**Jesus gjørdi vilja Guds, Hann hjálpti teimum neyðstøddu, Hann søkti Gud dagliga í bøn Hann talaði orð Guds, Hann livdi eitt reint og Heilagt lív, Hann søkti tað, sum omanfyri er.**

***Her á fold er tað synd og órættvísið, sum ráða.***
***Dagliga hoyra vit í fjølmiðlunum um morð, um stuldur, um seksuel frávik, um kríggj, um neyð og elendigheit.***
***Hjúnarbandið, sum er grundarsteinurin undir einum sunnum samfelag, er við at uppleysast, at takað ábyrgd fyri børnum og hvørjum øðrum, er í vesturheiminum í dag næstan vorði ein joke.***
***Vesturheimurin hevur tað seinasta árhundraði rópa eftir frælsi til at gera hvat eg vil, seksuelt frælsi, frælsi til at takað rúsandi evnir o.s.v. materalisman er komin í hásæti. Men hvat hava vit fingið?? stórar trupuleikar við sóttum, sum aids og aðrar sjúkur, kriminalitet, stórar rúsevnistrupuleikar, ólukkulig menniskju, soleiðis at sjálvmorsprosentið hækkar og deppresjónir, ella tunglyndi, fáa fólk at takað tablettir, roykja og takað rúsandi evnir, til tess at doyva tómrúmið, sum er innan í okkum.***
***Men Krossur Kristusar er ein nýggj byrjan fyri ein og hvønn, sum vendir sær til Jesus.***
***Við Krossin verður tað gamla lívið lagt afturum bak.***
***Við Krossin verða vit endurfødd og byrja at fáa nýggj virðir í hesum lívinum og eina tráan og vón um, at koma har, sum Hann er og ger okkum ein stað til reiðar.***
***Freistingar og royndir mega koma so leingi, sum vit eru í hesum heimi og í hesum likaminum, sum skal forganga, men tá ræður um, at vit hava eygu okkara vend á Hann…………………***
***Hebr.12:1-3***
***Latið tí eisini okkum, táið vit hava so stórt skýggj av vitnum rundan um okkum, leggja av okkum alt tað, ið tyngir, og syndina, sum hongur so føst uppi í okkum, og við toli renna skeiðið, ið okkum er fyrisett,***
***2 havandi eyguni vend á Jesus, upphavsmann og fullkomara trúarinnar, sum fyri gleðina, ið fyri Honum lá, tolin leið á krossi og legði einki í vanæruna – og situr nú við høgru síðu hásætis Guds!***
***3 Ja, hugsið um Hann, sum tolin hevur borið, at syndarar hava sagt Honum so nógv ímóti – so tit verða ikki troytt og mótleys í sálum tykkara!***

**Vónin sær forbí trongdirnar og royndirnar og stormarnar í hesum lívið.**

**Jóhs 16:33:**
Hetta havi Eg talað til tykkara, fyri at tit skulu hava frið í Mær. Í heiminum hava tit trongd, men verið hugreystir – Eg havi sigrað yvir heiminum!"

**Róm 5:3:**
Og ikki bert tað; vit rósa okkum av trongdunum við; tí vit vita, at trongdin virkar tol,
5:4: tolið roynt sinni, hitt roynda sinnið vón –
5:5: og vónin ger ikki til skammar; tí kærleiki Guds er útheltur í hjørtum okkara við Heilaga Andanum, sum givin okkum er.

Tey fyrstu kristnu vóru villig at verða kastaði fyri løvurnar, vegna tað vón tey høvdu í Kristusi.

**….bíblian dylir ikki fyri, at ofta má Guds fólk betala ein stóran prís fyri tað vón og trúgv tey hava á Jesus.**

**… Guds fólk verða altíð forfylgd….á ein ella annan hátt.**

**Hebr 11:32-12.3**:

– Tó, hví skal eg tala meir! Tíðin hevði jú ikki rokkið til, um eg skuldi sagt frá Gideon, Barak, Samson, Jefta, Dávid, Sámuel og profetunum,
sum við trúgv vunnu sigur á kongaríkjum, útintu rættvísi, fingu lyfti uppfylt, tiptu munn leyva, sløktu eldsbál, sluppu undan svørðsegg, fingu styrki eftir veikleika, vórðu veldig í bardaga, fingu fíggindaherar at víkja.
Kvinnur fingu hinar deyðu sínar aftur við uppreisn. Onnur vórðu løgd á pínubonk og tóku ikki við útloysing – fyri at tey kundu fáa lut í betri uppreisn.
Onnur máttu tola spott og húðfleinging, ja, bond og fangahús;
tey vórðu steinað, sagað sundur, freistað, dripin við svørði; tey gingu um í seyðaskinnum og geitaskinnum; tey liðu neyð, trongd, ringa viðferð
– heimurin var tey ikki verdur – tey flakkaðu um í oyðimørkum og fjøllum, í hellum og skorum jarðarinnar.
Og øll hesi – tóat tey høvdu vitnisburð fyri trúgv sína – fingu tó ikki tað, sum lovað var.
Tí Gud hevði frammanundan ætlað okkum nakað betri, so tey skuldu ikki fullkomast uttan okkum. Latið tí eisini okkum, táið vit hava so stórt skýggj av vitnum rundan um okkum, leggja av okkum alt tað, ið tyngir, og syndina, sum hongur so føst uppi í okkum, og við toli renna skeiðið, ið okkum er fyrisett,havandi eyguni vend á Jesus, upphavsmann og fullkomara trúarinnar, sum fyri gleðina, ið fyri Honum lá, tolin leið á krossi og legði einki í vanæruna – og situr nú við høgru síðu hásætis Guds!
Ja, hugsið um Hann, sum tolin hevur borið, at syndarar hava sagt Honum so nógv ímóti – so tit verða ikki troytt og mótleys í sálum tykkara!

***Krossurin argar… men fyri okkum trúgvandi er orðið um krossin - kraft…***

*1 Kor 1:18 Tí orð krossins er víst teimum dárskapur, sum fortapast, men okkum, sum frelst verða, er tað kraft Guds.*

***Hesin heimur kann verða trongur fyri eitt Guds barn, tí portrið er trongt og vegurin smalur, sum førðir til lívið***

**Hebr 13:7:**

Minnist vegleiðarar tykkara, sum hava talað orð Guds til tykkara! Aktið eftir, hvussu teir endaðu lív sítt, og eftirfylgið so trúgv teirra!

**Vónin og trúgvin kunnu ikki slítast sundur. Vónin er bíbilsk og neyðug í okkara kristinlívið hvønn dag.**

efb